

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 03 - 2012

# Vilja hava at vita hví Dong-stjórin fór frá

Ein meiriluti av politikarunum á Christiansborg krevja nú at fáa at vita, hví forstjórin í Dong Energy brádliga er farin frá. Tað almenna eigur meirilutan í felagnum, og andstøðuflokkarnir og Eindarlistin vilja hava at vita, hví Anders Eldrup er farin úr stjórastarvinum. Tað skal Bjarne Corydon, fíggjarmálaráðharri, siga politikarunum. Nevndarformaðurin í Dong Energy, Fritz Schur, hevur sagt, at Anders Eldrup er farin frá eftir avtalu við nevndina, men teir donsku fjølmiðlarnir gita, at forstjórin í roynd og veru hevur fingið sekkin. Sambært fjølmiðlunum kann tað vera hent, tí at roknskapurin hjá Dong Energy fyri 2011 var vánaligur, samstundis sum leiðslan í felagnum er skuldsett fyri oyðsl. Hetta seinna eru Ríkisgrannskoðararnir hjá Fólkatinginum farnir undir at kanna. -Tað sigur seg sjálvt, at vit vilja hava at vita, hví hetta er hent, tí tað er undranarvert, at ein so týðandi persónur fer úr Dong á ein tílíkan hátt, sigur Frank Aaen, fólkatingsmaður hjá Eindarlistanum, við Børsen í dag. Higartil hevur Bjarne Corydon, fíggjarmálaráðharri, ikki viljað sagt nakað um, at Anders Eldrup er farin frá. Fíggjarmálaráðharrin hevur bara sagt, at hann er kunnaður um tað. Áðrenn Anders Eldrup gjørdist stjóri í Dong fyri 11 árum síðani, hevði hann verið aðalstjóri í fíggjarmálaráðnum í 10 ár.